Álit

í

løgtingsmáli nr. 91/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskaparráð
(Áseting um eina árliga konjunkturfrágreiðing og eina árliga temafrágreiðing)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð 7. mai 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. og 13. mai 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsbankan og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Galdandi løgtingslóg um Búskaparráð ásetir, at ráðið skal árliga gera tvær konjunkturfrágreiðingar, sum verða almannakunngjørdar ávikavist 1. mars og 1. september. Harumframt kann Búskaparráðið gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

Við hesum lógaruppskotinum verður skotið upp, at heldur enn at gera tvær lógarkravdar árligar konjunkturfrágreiðingar við møguleika fyri eisini at gera temafrágreiðingar eftir tørvi, skal Búskaparráðið nú gera eina lógarkravda konjunkturfrágreiðing og eina lógarkravda temafrágreiðing um árið. Harumframt kann Búskaparráðið framvegis ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum, eins og eftir galdandi løgtingslóg.

Árliga konjunkturfrágreiðingin skal, sambært uppskotinum, verða almannakunngjørd 1. mars, meðan eingin áseting er um, nær temafrágreiðingin skal verða almannakunngjørd. 1. mars verður hildin at vera ein passandi dagur fyri at almannakunngera konjunkturfrágreiðingina, tí tá verður arbeitt við játtanarkørmunum fyri komandi árið, og tá eru hagtølini frá undanfarna ári eisini rættiliga nýggj.

Við hesi broytingini verður mett, at avmarkaða arbeiðsorkan hjá Búskaparráðnum verður betur brúkt. Uppskotið er gjørt í samráði við Búskaparráðið og Landsbankan.

Undir nevndarviðgerðini hevur Fíggjarnevndin fingið upplýst, at ætlanin er ikki, at landsstýrið ella onnur skulu kunna bíleggja eina ávísa temafrágreiðing frá Búskaparráðnum, men at Búskaparráðið sjálvt skal velja, hvørji evni verða viðgjørd í frágreiðingunum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 15. mai 2026

Helgi Abrahamsen formaður	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur næstforkvinna	Bill Justinussen
Bjarni Hammer	Eyðgunn Samuelsen	Sirið Stenberg
	Ruth Vang	